Grannar:

# Kongaminnið vanrøkt



*Grannar við Gripsheygg, har Kongaminnið er bygt, hava fleiri ferðir víst á, at økið átti at verði betri røkt. Á myndini sæst, at flísarnir eru illa farnir, og at málingin, ótangar máladu á Kongaminnið, framvegis er á fornminninum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Grannarnir við Gripsheygg hava fleiri ferðir víst á, at økið við Kongaminnið verður ikki nóg væl røkt. Býráðið hevur framt nakrar ábøtur, men framvegis kunnu fleiri ábøtur gerast, so økið gerst enn høggligari hjá teimum vitjandi, halda grannarnir**

KONGAMINNIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Seinastu tíðina hava grannar við Hoyvíksvegin fleiri ferðir víst á, at økið við Kongaminnið verður ikki nóg væl røkt. Flísarnir er illa farnir, gongugøtan niðan á Kongaminnið er vanrøkt og framvegis er máling á sjálvum fornminninum. Bøurin er heldur ikki nøkur vøkur sjón longur, tí hann hevur ikki verið røktur seinnu árini.

Grannarnir meta tað verða stak óheppið, at Kongaminnið sleppur at fara so illa, uttan at nakrar ábøtur verða gjørdar. Staðið er sera væl vitjað alt árið, og nú summar er, eru tað serliga útlendingar, ið leita sær niðan á Kongaminnið. Staðið er sera vælumtókt pláss hjá útlendingum at taka myndir av Tórshavn, tí útsýnið er frágera gott.

## Gøtan fríðkað

Føroyingar og tey mongu útlendsku ferðafólkini kunnu nú fegnast um, at býráðið hevur framt nakrar ábøtur á Gripsheyggi, ið er heyggurin, Kongaminnið er bygt á. Gongugøtan ,sum hevur staðið órøkt, er nú fríðkað, og tí verður tað høggligari hjá gestunum at leita sær niðan á Kongaminnið.

Grannarnir meta tó, at býráðið kundi tikið enn størri tøk fyri at gera Kongaminnið enn betri stað hjá teimum vitjandi. Teir vísa millum annað á, at ein gongugøta frá R.C. Effersøesgøtu niðan á Kongaminnið hevði verið ynskilig, tí tað ørkymlar útlendsku gestirnar, at tey mugu ganga niðanum, tá tey koma úr býnum

Grannarnar við Gripsheygg hava fleiri ferðir kent seg noyddar at veita útlendsku ferðafólkunum eina hjálpandi hond, so at útlendsku ferðafólkini koma niðan á Kongaminnið í øllum góðum.

# Mærsk avlýsti aftur

FLOGFERÐSLA
*Páll Holm Johannesen*

Í gjár, mánadagin, avlýsti Mærsk Air aftur ein av flogtúrunum til Føroya. Talan var um ein tekniskan trupulleika, og tá tað ikki bar til at seta annað flogfarð á Føroyaleiðina var neyðugt at avlýsa alla flúgvingina úr Keypmannahavn mánadagin.

Av nýggju skrivstovuni hjá Mærsk í Havn, siga tey, at væntandi kemur øll flúgvingin í rættlag aftur týsdagin. Ætlandi verða tvey flogførð sett inn á Føroyaleiðina, so øll ferðafólkini kunnu koma á rætt stað týsdagin, siga tey frá Mærsk Air.

# Kongaminnið í stuttum

KONGAMINNIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Tað var gróthøggarin, Jákup Andreas Arge, eisini kendur sum jamtmaðurin, sum bygdi Kongaminnið í 1882. Kongaminnið varð reist fyri at minna um fyrstu kongavitjanina í Føroyum í 1872.

Umframt Kongaminnið, so bygdi Jákup Andreas Arge bæði Amtmansborgina og Býráðshúsið í Havn. Í 1911 lat føroyski gróthøggarin danakongi eitt modell av kongaminninum, og tá segði kongur við Jákup Andreas, at hann fór at seta modellið har hann: "daglig kunne have det for, og derved blive mindet om, den realitet, færinger viste kongen".

Tað hevur mong munnhøggan um Kongaminnið á Gripsheyggið. Kristin í Geil, sum var blaðstjórið á Tingakrossi, var ein, ið ikki fór væl við fornminninum. Hóast pápin, Djóni í Geil, var ein monnumum aftanfyri byggingina av Kongaminninum, so var Kristin í Geil ikki bangin fyri at vísa sína misnøgd við Kongaminnið.

Í blaðnum Tingakrossi góð 25 ár eftir Kongaminnið varð bygt, kallaði hann Kongaminnið fyri "snobbernes obelisk".



# Stakkalastjørna ella Føroyar fyri øll



*– Ein Deyvur er ikki deyvur í hesi løtuni, nú hann fær alt, ið sagt verður á sínum teknmáli. Ein í koyristóli er ikki lamin, um hann frítt kann trilla seg inn og út um dyrnar og á wc, segði Marjun og vísti á, hvussu umráðandi tað er, at samfelagið verður innrættað til øll. Petur Zachariassen var tulkur, so tey deyvu eisini kundu fáa gleði av røðuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Á fólkafundinum sunnudagin á vestanstevnu, helt Marjun Sigurðsdóttir, formaður í Meginfelag teirra Brekaðu, røðu. Í røðu síni tosaði hon um korini hjá teimum førleikatarnaðu fyrr og nú**

VESTANSTEVNA
*Rúna Sivertsen*

Sunnudagin seinnapartin var fólkafundur í løgmansgarðinum í Sandavági. Tað er synd at siga, at veðrið var til vildar á vestanstevnu, men hesa løtuna, fólkafundurin var, sleit hann í. Fitt av fólki var komið saman at lýða á, meðan formaðurin í MBF, Marjun Sigurðdóttir, flutti fram røðu.

Í samrøðu við Sosialin sigur Marjun, at tað eru stór framstig hend til frama fyri tey førleikatarnaðu tey 40 árini, hon hevur starvast innan økið.

Marjun er útbúgvin sosialráðgevi. Longu meðan meðan hon las niðri, varð hon spurd, um hon ikki vildi fara á Rødbygaard í starvsvenjing, so at hon samstundis kundi vera við at hjálpa til við arbeiðnum at fáa tey við menningartarni heim til Føroya.

Í røðu síni vísir hon eitt nú á, hvussu tey við menningar- og førleikatarni fyrr so at siga eingi rættindi høvdu, og nærmast vórðu útstoytt av samfelagnum.

Men hóast framstig, er tó langt eftir á mál. Og tíverri kemur fyri, at afturstig henda. Í røðuni er Marjun bersøgin og sigur, at tað er ein landaskomm, at SvF nú gevst at tulka Dag&Viku fyri teimum deyvu.

Vit geva Marjuni orðið:

Góðu fyriskiparar, góðu Vestanstevnugestir. Tøkk fyri at mær verður sýnd tað álit, at siga nøkur orð á fólkafundi í Løgmansgarðinum.

Kendi eitt sindur av fjáltri at skulu halda røðu á so tignarligum staði. Leitaði mær tí stuðul úr ættarbandinum og fann tveir løgmenn, nevniliga Sámal Petersen og Hans Jacobsen Debes, umframt Armgarð Mariu Weihe og Blankskálahanus á trænum. Tað hjálpti.

Meginfelag teirra brekaðu er ein felagsskapur av 23 áhugafeløgum, har eg havi verið formaður í gott eitt ár. Somuleiðis eri eg í stýrisbólkinum fyri "Ár teirra brekaðu", ið landsstýrismaðurin í almannamálum hevur sett at skipa fyri í hesum árinum, har eitt av endamálunum er, at gera førleikatarnað sjónlig í samfelagnum.

Borgarstjórin í Fuglafirði kom við hugskotinum, at stevnurnar, fólksins veitslur, kanska vóru eitt gott høvi. Og MBF og limafeløg hava tikið av. Slagorðið er samfelagið fyri øll, helst við ongum spurnartekni, sum á plaktini.

## Heimarættur

At hava heimarætt. At øll fólk í einum húski, í eini kommunu ella í landinum skulu kenna seg heima á jøvnum føti við øll onnur.

So hevur ikki altíð verið og kanska er tað heldur ikki heilt einfalt í dag, men tað sær út til, at kommunurnar í stórum álvara eru farnar undir eldraøki, kanska verður tann vælvijin fluttur yvir á førleikatarnað so við og við.

Eg skal nevna nøkur dømi frá søguligu gongdini, sum kanska tykjast okkum láturlig í dag. Tey flestu halda at orðið at fara á húsagang fevnir um virkir, skip, bankar og tílíkt.

Men orðið hevur sín uppruna frá tí at fólk, sokallað uppgávufólk, ið fevndi um brekað, gomul og fyrrverandi tænastufólk, ið vóru send garð av garði, bygd úr bygd, eitt avtalað tíðarskeið.

Hesi fólk høvdu ongan møguleika at kenna seg heima nakrastaðni. Tey fóru rættuliga á húsagang.

## Stakkalastjørnan

Eitt annað gott føroyskt dømi um hetta er fyribrygdið stakkalastjørnan. Gongustjørnan Venus, sum ávísar tíðir á árinum sæst skínandi á kvøldhimmalinum, verður eisini nevnd stakkalastjørnan.

Hetta sigst koma av, at ein óskrivað lóg hevur verið galdandi frá gamlari tíð av, um at var ein inni, ið kundi metast sum stakkal, tá ið stjørnan kom upp, skuldi hann ikki koyrast av garði, men sleppa at verða um náttina. Hesi fólk hava í hvussu so er ikki kent, at tey áttu heimarætt.

Ofta fingu fólk nøvn eftir brekinum, t.d. Dulidanjal, Prukkelin og ein maður, ið hevið eftirgjørt bein, fekk eyknevnið bein. Hann gjørdi ikki mætari enn at fáa sær Bein til eftirnavn.

## Trúgv og pátrúgv

Eitt annað dømi er tikið úr "Hovs søgu" eftir Jákup Berg (klipp úr ummælinum hjá undirritaðu av bókini hjá Doris Hansen "Søgan um hini" Dimmalætting 22.8.1996). Søgan er bæði um, hvussu óvitar høvdu fragd av at vinna einum brekaðum neisir, og um sterku trúnna á bæði Hin Hægsta og Hin Versta.

"Einaferð Bøkkurin (so kallaðist maðurin) setti kærar upp…. høvdu óvitarnir fingið fatur á eini magnet og fingu karðatindarnar at ganga kykir á borðinum…. Bøkkurin bliknaði.

Eyguni stardu ramliga at tindunum, ið gingu kykir og vildu ikki steðga aftur. Hann tók tindarnar úr munninum, reisti seg og helt fyri: "Farið út hiðani, her er ikki alt, sum tað eigur at vera. Fanin er komin í stovuna".

Seinni verður, frá aðrari heimild sagt frá, at ein lækni spyr Bøkkin, um hann kundi fáa hendur og føtur, ið vóru vanskapt, tá ið hann var deyður til granskingarendamál. Bøkkurin svarar, eftir at hava ráðført seg við matmóðrina: "Min madmoder siger, at jeg kan ikke for Guds domstol at stå foruden klør og kleyvar på".

## Vælferðarsamfelag fyri øll

Í fleiri ár tíggir sendu vit fólk, ið bóru eitthvørt brek av landinum. Í hesum tíðarskeiðinum, frá tí vit fóru at senda fólk av landinum, til vit mestsum hildu uppat við hesum, eru tað nógv, ið onganstaðni kendu seg eiga heimarætt.

Siðani seinast í 1960 árunum er bæði hugburðurin millum fólk og politiski viljin broyttur rætta vegin. Mitt í ringastu kreppuárunum tóku vit yvir alla ábyrgd við rammulógini frá 1995 eftir boðum frá donsku stjørnini.

Vit kunnu siga, at eitt vælferðarsamfelag, ið er fyri øll, er bygt á tríggjar høvuðssúlur:

1) Samhaldsfesti. At tú við at gjalda skatt tryggjar tær t.d. fólkapensjón, tá ið tú ert 67 ár.

2) Um nakað er galið við førleikanum áðrenn tú fyllir 67 ár, so eigur samfelagið at hjálpa tær við at minka um fylgjurnar av førleikatarni, t.d. við einum koyristóli, hoyritóli, sjúkraviðgerð, serligari undirvísing, teknmálstulking ella annað, so tú verður virkin aftur eftir førimuni.

3) Økisábyrgd ella sektorábyrgd. Spurningurin um vælferð er ikki bert eitt almannamál, tað er líka nógv ein spurningur um hvussu vit skipa okkara skúlar, okkara arbeiðspláss, okkara tíðindatænastu, okkara samferðslu o.s.fr.

## Atgongd til samfelagstænastur

Atgongd til samfelagstænastur og javnstøða millum førleikatarnað og hini til skúlagongd, útbúgving, arbeiði, vanligt privat lív, samferðslu og annað er grundarsteinurin undir eini virðiligari tilveru.

Ein samfelagstænasta er infrastrukturin í einum landi, her uppi í at kunna koma millum oyggjarnar.

Til november í fjør hevur tað verið soleiðis, at skuldi tú sum rørslutarnaður millum oyggjarnar, var einasti møguleiki at sita í bili/bussi á dekkinum í deymi frá bensini, olju, fisk, slógv og burturkast. Hetta er framvegis støðan á flestu Strandferðsluskipum, Teistin millum Gomlu Rætt og Skopum undantikin.

Tí er allarstørsta hendingin á samferðsluøkinum, íð er hent rørslutarnaðum hetta seinasta árið undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund.

Nú kunnu rørslutarnað eins og onnur, sita rein og noslig í einum bili (eg sigi við vilja ikki bussi) og koma at vitja í Vágum og á flogvøllin og umvent. Men við hvørt veit ikki høgra hvat vinstra ger. Nýggir bussar eru komnir at koyra hesa somu leið, men her sleppur eingin koyristólur við.

## Teknikkur lættir um

At vera førleikatarnaður er oftast eitt lívslangt mein. Men meini gerst torførari og verri at liva við av øllum samfelagsskaptu forðingunum. Ein blindur, ið tosar í telefon ella lesur bøkur á talandi teldu ella lurtar eftir ljóðbondum, er ikki blindur í tí støðuni.

Ein Deyvur er ikki deyvur í hesi løtuni, nú hann fær alt, ið sagt verður á sínum teknmáli. Ein í koyristóli er ikki lamin, um hann frítt kann trilla seg inn og út um dyrnar og á wc.

Tekniska menningin hevur í nógvum førum lætt um hjá førleikatarnaðum. Vágatunnilin er eitt gott dømi um, hvussu framkomin teknikkur kan gera tað léttari hjá einum rørslutarnaðum at búgva í einum oyggjalandi.

Fremstu SMS-boð brúkararnir eru tey deyvu. Telefonin er nú gerandisdagur eisini hjá teimum. Súmbol og lættlisin tekstur hjálpur nógvum, ið eru lesiveik. Føroyskt ljóð á talandi teldu, er nýggjasta frambrotið her heima hjá okkum.

Men brúka vit teknikkin soleiðis, at hann bert hóskar nørdum og teimum ungu, ið kunnu fylgja við, so verður gjógvin djúpari og fráskiljingin verður munadyggari. Ein miðnámsskúli fyri menningartarnað er annað nýbrot, sum vit vanta okkum nógv av.

## Eins atgongd til kunning

Ein høvuðsyvirskrift í øllum Europu, og helst aðrastaðni við, er líka atgongd til informationssamfelagið. Her eru nógv útihýst. Vit hoyrdu júst nú ein dagin, at Sjónvarpið ikki fer at tulka Dag og viku longur, og tað er landaskomm.

Fortreytin fyri at geva sítt til at ávirka politiska, sivila og sosiala samfelagið, er at tú hevur atgongd til somu information sum onnur.

Nýggja tøknin opnar nógvar dyr, men steingir eins nógvar, um ikki verður hugsað um, hvussu hon verður skapa og hvørjum hon er ætlað, einum úrvaldum skara ella fólkum flest.

Eitt loysunarorð, ið er frammi og eisini er lóggivið um nógvastaðni, er "universel design". Hetta at tilevnað verður, so eisini kropnar hendur kunnu fáa eina hurð upp ella ein heimasíða, ið verður fata av fólki flest.

## Gaman og álvara

Limirnir i feløgunum ið mynda MBF hittast til gaman og álvara. Fleiri feløg hava ognað sær onkran sang sum teirra, har allir limirnit vita hvat meint verður við, tá ið júst hesin sangurin verður sungin. Felagið fyri hoyrubrekað hava ein poetiskan og skemtiligan sang, har afturvendandi orði er "ha". Parkinsonfelagið hevur ognað sær "At liva, tað er at elska" í týðing Mikkjals á Ryggi.

*At liva, tað er at elska*
*Tað besta í tíni sál;*
*At liva, tað er at virka*
*og seta so bjart sítt mál.*

*At liva, tað er at finna*
*Tað hægsta, í heimi er;*
*At liva, tað er at vinna*
*Til sannleika á síni ferð.*

*At liva, tað er at køva*
*Órætt og lygn og synd;*
*At liva, tað er sum havið*
*At spegla himmalsins*
*mynd.*

Vit frá MBF og Ár teirra brekaðu luttaka fegin á Vestanstevnuni. Framhaldandi gott stevnuhald. Tøkk fyri.